sonin:

# rðin longsul





- Tvey ting kunnu henda, tá sorgin rakar soleiðis. Antin syndrast familjan ella heldur hon 100% saman og vit valdu tað seinna, sigur Jens

Mynd: Jens Kristian Vang





minnist eg ein dag, eg lá á bonkinum í heimi okkara í Trongisvági. Í húsunum, sum vit forrestin sakna nógv. Eg spurdi Hávard, um eg bara skuldi gevast at spæla tónleik. Hann hugdi undarliga uppá meg við einum loyndarfullum smíli. Hann segði; nei, pabba, tað mást tú bestemt ikki gera og tað var, sum visti hann meira, enn eg hugsaði. Eg hevði sjálvur hugsað ein løgnan tanka; Onkur í familjuni fór at doyggja. Og øll høvdu vit havt tann tankan hvør í sínum lag, sigur Jens, og leggur dent á, at alt hetta er beint áðrenn vanlukkuna.

- Tað er so nógv ein kundi greitt frá í samband við Hávard, at tað upp í eina heila bók, sigur Jens.

## Fór ikki at blíva gamal

- Mamman og Hávard tosaðu eisini saman.Hann segði, at hann fór ikki at blíva gamal, sigur Jens.

- Hávard bleiv ikki guitarleikari, men hann hevði evnini og gávurnar. Hann spældi saman við Mikkjal frá bólkinum SIC, Kristian Djurhuus, Edmund í Garði og ein góður vinmaður var eisini Dánjal Jacobsen. Og so má eg ikki gloyma Egil Midjord, teir vóru bestu vinir og vuksu upp saman, sigur Jens, og leggur afturat, at hann kundi nevnt fleiri.

- Teir høvdu dreym um ein bólk, men tað bleiv so ongantíð.

## Blue Moon

- So komu vit til Havnar og búðu í íbúð hjá familju. Og so var tað tað; hvussu byggir ein lívið uppaftur?

Nógv varð hugsað um Kristel og Jens setti seg í samband við Musikkskúlan. Har fekk hann at vita, at um hann ynskti klaverundirvísing, so var at søkja.

- Tann, ið ikki søkti, tað var eg, staðfestir Jens, og tí var undranin og gleðin stór, tá bræv kom um, at Kristel slapp inn, og familjan helt tað í byrjanini vera eina pappírsvillu.

- Og klaverið ætlar hon at halda fast við framyvir, nú hon verður 17 ár, sigur ein glaður pápi.

Byrjanin til konsertirnar við Jens og Kristel kom, tá Edvard N. Debess hevði hana við í eini Svf sending. Jens helt, at stuttligt var at gjørt meira burturúr og tónleikararnir vóru við uppá hugskotið.

- Konsertin bleiv í Læraraskúlahøllini og Jan Zachariassen tók upp. Tá sang hon fyrstu ferð Blue Moon. Sjálv tímdi hon ikki at hoyra uptøkuna, tí hon helt hana sikkurt vera ov vánaliga, men tað hevur víst seg, at hon er væl dámd, sigur Jens fegin.

Saman fara Jens og Kristel at hava eina gallakonsert nakað skjótt, men Jens staðfestir, at hon er við at gerast vaksin og ganga egnar leiðir.

- Nú hevur hon eisini verið so longi saman við mær, sigur Jens.

## Kristel og Torbjørn

- Kristel hevur beiggjan Torbjørn, sum dugir væl at gera orð og løg og tey hava gjørt okkurt saman og hava ætlanir, men eg veit ikki hvussu nógv eg skal avdúka enn, sigur Jens, sum tó staðfestir, at talan er um spennandi ætlanir.

- Eg og Marner, beiggi mín, hava eisini tosað um at spæla eitt sindur aftur, mest til viðlíkahald, men eg veit ikki. Og stuttligt hevði verið at gjørt okkurt tiltak til frama fyri okkurt gott endamál, sigur Jens Lisberg.

Ein maður, sum nú er gerandisgestur í Havnargøtum, ein sum kennir sakn, sorg og longsul, ein tónleikaglað sál, sum saman við familjuni hevur bart seg ígjøgnum sorgina við hjálp av samanhaldi í familjuni og sum er komin heilur útaftur í ljósið, eisini pall ljósið.